# Heimahjálpin og Skrellimaðurin

ÓLAVUR Í BEITI
rithøvundur



Hatta vóru sanniliga tvey Ymisk lív í sendingini at sama navni í sjónvarpinum sunnudagin! Tað má sigast!

Tað var hugaligt at síggja Jóhan – hetta fryntliga, dámliga og brosandi menniskja av Guds náði – fara runt í Havnargøtum og tøma skrellispannir, og so eisini síggja hann í eini heilt aðrari støðu, tá ið hann umrøddi sín besta vin sum var farin higani foldum frá – Jóhan mátti taka lummaklútin fram, hann feldi nøkur tár!

Tú sást sama mann – har hann stríddist raskur og fegin við at sópa undan havnarfólkum – og so kenslurnar sum brutu fram, tá ið ein av hansara kæru var farin – styrki og sál í einum og sama manni!

Hitt lívið var av heilt øðrum slagi! Nú møttu vit einum hástórum, arrogantum, frekum, nassvísum og búkstórum manni sum hálovaði sær sjálvum og segði seg vera einasta høvund sum dugdi at skriva, og ikki bert høvund, men blaðfólkini dugdu heldur ikki at skriva. Henda heimahjálpin – vit kunnu kalla hann so, tí hann stríðist heima við hús meðan konan ferðast runt um høv at kanna hval og fisk og goggur – sum nú hevur skrivað eina bók sum hann sigur fólk hava lisið, hevði ikki stóra virðing fyri øðrum enn sær sjálvum! Einki annað er gott, uttan tað eg geri! Sumt dugir ikki at skriva, onnur eru "forbannaði bygdafrell"!

Her verður ikki lagt fingrar ímillum – her er eingin sum helst virðing fyri øðrum mannalívi enn sínum egna – alt annað er dugnaleyst! Henda markleyst og niðurgerandi skolan og hástóra skalluta kúlan átti ikki at sloppi framat í sjónvarpinum um tey sum stílaðu fyri høvdu nakað sum helst vit og skil!

At seta tvey so sera ólík og ambivalent lív saman í eini sending er eitt tað syrgiligasta eg havi sæð í sjónvarpinum! At seta Jóhan – henda fitta og meinaleysa og góða mann – saman við hesi rotnu - bæði innan og uttan á skræuni - heimahjálpini er tað sama sum at gera sending um djevulskap og eyðmjúkleika!

Tí tað at tú hevði so stóra kontrast í innihaldi, gjørdi, at hvørjaferð tú vart upplívgaður av Jóhan og hansara brosandi medferð – av fitta persóninum Jóhan – so vart tú sum rivin úr stólinum, tá ið henda glorifiseraða heimahjálpin stakk stóru nøsina fram á skíggjan og oysti av innvølinum út yvir hvørja stovu í landinum! Har var eingin eyðmjúkleiki og virðing! Har var eingin sál, men oyðandi skræpa og einki annað!

Jóhan tosaði við virðing um tey fólk hann hevði við at gera!

CJ spítti í gronina á øllum tí hann hevði við at gera!

# Toftavatn er náttúrufriðað

ANNA MARIA FOSAA
plantuvistfrøðingur



Seinastu tíðina hava nógvar hugfloygdar verkætlanir verið frammi í fjølmiðlunum. Ein av hesum verkætlanum er at gera ein undirsjóvartunnil undir Skálafjørðin, og hesin tunnil skal ganga upp á økinum við Toftavatn, og ein onnur verkætlan er at gera íbúðir til 800 fólk á sama øki. Hetta kann snøgt sagt ikki fremjast í verki, tí fyri meira enn tólv árum síðani avgjørdi Náttúrufriðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu og Yvirfriðingarnevndin at lata Toftavatn og økið uttanum náttúrufriða. Náttúrufriðingin er gjørd við tí fyri eyga at varðveita økið í sínum natúrliga líki, soleiðis at plantur, djór og jarðfrøðilig fyribrigdi verða varðveitt óbroytt. Í kunngerðini verður eisini sagt, at tað ikki er loyvt at byggja, taka grót, mold, sand, eyr, plantur og djór (sí "Kunngerð um friðing av økinum um Toftavatn" dagf. 18.03.1994)



**Kunngerð**

**um friðing av økinum um Toftavatn**



Sagt verður frá, at náttúrufriðingarnevndin fyri Eysturoyar sýslu og yvirfriðingarnevndin sambært løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970, II parti, hava gjørt av at friða økið um Toftavatn eftir marki ætlað at ganga:

eftir Æðuvíkarvegnum úr vegamótinum Rituvíkarvegur/Æðuvíkarvegur í vegamótið Æðuvíkarvegurin/Agnið - úr vegamótinum Æðuvíkarvegurin/Agnið til varða 110 og víðari beint norðan fyri Hamravøtnini í kotu 130 - úr kotu 130 norður eftir røðini til Húsalongd og víðari til kotu 106 - úr kotu 106 í beinan eystan í Rituvíkarvegurin/Æðuvíkarvegurin.

Tað friðaða øki er uppmerkt á omanfyri nevnda korti.

Friðingin ber sambært § 9 í náttúrufriðingarlógini í sær, tá ikki annað við úrskurði er ásett, at umrødda øki skal varðveitast í sínum nátúrliga líki og við varðveitslu av plantum, djórum og jarðfrøðisligum fyribrigdum varðveitast óbroytt, soleiðis at serstakliga øll bygging, setan av steyrum, búðum ella øðrum hesum lík, ið kunnu misprýða, eins væl og tøka av gróti, mold, sandi, eyri, plantum og djórum er forboðin.

Friðingin ber tó ikki í sær avmarking av nýtsluni av økinum sum higartil til landbúnaðarendamál, herundir uppdyrking. Friðarmyndugleikarnir kunnu eisini gera frávik frá forboðnum um bygging, tá talan er um bygging til landbúnaðarendamál.

Málið kemur fyri á fundi, ið verður settur á økinum
**friggjadagin 8. apríl 1994, kl. 10.30.**
Møtt verður við Sjómansheimið.

Tey, ið møta á fundi, fáa høvi til at bera síni sjónarmið fram munnliga ella lata tey skrivliga inn.

Tey, ið hava fingið fundarboð og ikki ynskja at koma til fundar, hava rætt til skrivliga at senda umrøðu av málinum sambært § 13, stk. 5, í náttúrufriðingarlógini.

Føroya Yvirfriðingarnevnd, hin 18.03.94

**Joen H. Andreassen**

22/3-94 Dim.

### Virðismikið tilfeingi

Tað er ilt at ímynda sær, hvussu allar hesar verkætlanir, sum eru frammi, kunnu setast í verk, uttan at kunngerðin um friðing av økinum um Toftavatn verður brotin. Toftavatn er nakað serstakt, – tað er ikki ovsagt. Umframt at økið er sera náttúruvakurt, verður tað mett sum eitt av teimum økjum í Føroyum, ið beinanvegin átti at verið lagt út til ein tjóðargarð, har fólk kunnu njóta náttúru, sum verður varðveitt fyri náttúrunnar sakir; har tað verður granskað og kunnað um náttúruna. Men eru vit veruliga so fátæk í hesum landi, at vit ikki duga at síggja náttúruna sum eitt virðismikið tilfeingi, sum vit eiga at ansa sera væl eftir og varðveita í sínum natúrliga líki?

### Friðingarverd øki

Í bókini "Føroya náttúra – lívfrøðiligt margfeldi", ið kom út fyri einum mánaði síðan, er ein talva gjørd yvir, hvørji náttúruøki eru friðingarverd orsakað av teirra serliga lívfrøðiliga margfeldi. Eitt av hesum økjum er Toftavatn og øki uttanum. Øki uttanum er sera virðismikið, tí her er eitt serliga gróðrarmikið lyngøki, sum ikki hevur sín líka aðrastaðni í Føroyum. Og her ber eisini til at finna fleiri sjáldsom plantusløg og fuglasløg.

Eg eri greið um, at tað er ógvuliga trupult at grundgeva fyri, at eitt øki skal friðast, bert tí vit finna eina serliga plantu har, sum kanska ikki finst aðrastaðni í Føroyum, mótvegis fíggjartungum verkætlanum so sum undirsjóvartunlum og stórum íbúðarhúsum. Men eg geri tað kortini, tí at eg eri sannførd um, at tað eru nógv við mær, sum halda, at náttúran eigur at varðveitast.

### Avtala millum lond

Vit vilja sleppa at vera við á altjóða leikpallinum, hava undirskrivað sáttmálar, ið áleggja okkum at varðveita náttúruna. Ein av teimum sáttmálunum, sum hevur verið mest frammi í seinastuni, er sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldi. Hesin sáttmáli áleggur okkum at gera skipanir, ið hava til endamáls at verja plantur og djór. Í sambandi við arbeiðið at verja lívfrøðiliga margfeldið liggja stórar avbjóðingar fyri framman. Við tí fyri eyga at seta ferð á hetta arbeiði varð í 2002 enn ein avtala millum lond samtykt. Hendan avtala hevur til endamáls at seta átøk í verk, sum skulu steðga afturgongdini av plantum og djórum seinast í 2010. Við teirri verkætlan, sum er í umbúna við Toftavatn, sær tað ikki út til, at vit ætla okkum at náa 2010-málinum – tvørturímóti.

### Eingin náttúrufyrisiting

Tá tú tosar við útlendskar samstarvsfelagar, kennir tú teg ofta illa av at noyðast at viðganga,

· at vit ikki hava nakað øki, ið veruliga er náttúrufriðað,

· at vit ikki hava nakra náttúrufyrisiting,

· at vit ikki eru farin í gongd við 2010-málið

· og at vit nú eru í ferð við at oyðileggja eitt av okkara mest fjølbroyttu lyngøkjum til fyrimunar fyri tunlar og íbúðarbygging.

Hví eru vit komin so stutt á okkara náttúruøki, tá ið vit liva av okkara náttúru og eru bundin av at skula røkja náttúruna so væl sum til ber? Er tað tí at vit ikki hava ráð? Nei tað haldi eg ikki.

Eg fái meg illa at trúgva, at allir eysturoyingar og Føroya fólk annars, sum kenna til Toftavatn, eru samd, tá talan er um at gera so stór inntriv á økið, at tað ikki verður til at kenna aftur.

Eg vil tí heita so inniliga á tykkum um at taka friðingina í álvara og finna eitt annað øki til slíkt virksemi.

# Opið bræv til Hans Paula Strøm og Bárð Nielsen

LIS EKLUND Í NIÐRISTOVU
Forkvinna í Javna

Seinastu mánaðirnar hava vit verið vitni til, at broytingar eru framdar, sum hava havt óhepnar avleiðingar fyri tey við menningartarni. Vit kunnu t. d. nevna broytingarnar í dagstovnalógini og forsorgarlógini, har Javni vísti á, at broytingarnar ikki vóru nóg væl fyrireikaðar, og tí mælti Javni frá at seta broytingarnar í verk. Hesar vórðu kortini framdar, og hava vit seinastu mánaðirnar sæð, hvussu óheppið hetta hevur verið fyri nógv børn við menningartarni og teirra familjur. Enn einaferð mugu vit rópa varskó, tí nú eru aftur broytingar ávegis, sum koma at fáa óhepna ávirkan á umstøðurnar hjá fólki við menningartarni. Í samband við sáttmálasamráðingarnar millum Pedagogfelagið og Fíggjarmálaráðið vilja vit vísa á, at tað er umráðandi og neyðugt at taka atlit til teirra, sum koma at liva við teimum avleiðingum, ið standast av tí møguligu semju, partarnir koma til. Javni kann ikki góðtaka, at Fíggjarmálaráðið krevur, at øll tænastumannastørv innan sambýla- og bústovnaøkið fella burtur. Hetta fer at skapa óneyðugan ótryggleika á økinum og fer at seta øll tey við menningartarni í eina ógvuliga trupla støðu, næstu ferð t.d. arbeiðssteðgur er. Tað er alt avgerandi fyri tey við menningartarni, at tað altíð eru starvsfólk tøk úti í bústøðunum. Tað er jú teirra heim, vit tosa um. At avtaka tænastumannastørvini kann føra við sær, at starvsfólk samvitskuleyst verða tikin gíslar, ella – um tey sýta fyri at vera gíslar – at menningartarnað og ófullfør verða viðfarin sum kastibløka. Hvørki er virðiligt í einum modernaðum samfelag. Tað er ikki uttan grund, at størv á sambýla- og bústovnaøkinum eru tænastumannastørv, og Javni vil fegin fáa at vita frá Bárði Nielsen og Hans Paula Strøm, hvussu teir ætlar at tryggja teimum menningartarnaðu á sambýlum og bústovnum, at tey altíð fara at hava starvsfólk at hjálpa sær, hóast øll tænastumannastørvini fella burtur. Sáttmálasamráðingar eiga ikki bert at snúgva seg um krónur og oyru, men eisini um hvørja tænastu vit veita teimum, sum hava tørv á serligum tilboðum. Tí heita vit á allar partar í samráðingunum um at taka neyðugu atlitini til tey við menningartarni, sum búgva á sambýlum og bústovnum kring landið.

# Kvøldseta í VB húsinum

**Leygarkvøldið 28. oktober verður kvøldseta við ábiti í VB húsinum og tónleikaskráin er er forvitnislig, tí Peter Abrahamsen og Bell Pepper Boys, Stanley Samuelsen og Glymur fara á pallin. Deiggj spælir til dansin aftaná kvøldsetuna**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Í Vági verður spennandi tiltak leygarkvøldið, tá VB húsið verður karmur um kvøldsetu, har tónleikurin er sera fjøllbroyttur og forvitnisligur.

Á skránni er kvøldseta við ábiti, konsert og dansi

Danski countrybólkurin Peter Abrahamsen & Bell Pepper Boys kemur saman við Stanley Samuelsen og kórinum Glymi, at standa fyri tí tónleikaliga partinum av kvøldinum.

Á matarseðlinum er góð fiskasuppa við breyði. Deiggj spælir til dansin.

Forsølan til tiltakið er byrjað og atgongumerki til kvøldsetuna kosta 120 krónur. Til dansin 120 krónur og atgongumerki til kvøldsetu og dans 200 krónur.

Atgongumerkir kunnu keypast í forsølu í Kunningarstovuni í Vági og Kunningarstovuni á Tvøroyri.

Tað er Felagið Jóansøkufestivalurin sum skipar fyri tiltakinum saman við Norðurlandahúsinum.